Fylgiskjal 4

Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

Hoyringssvar til løgtingslóg um leigustuðul

Verandi skipan

Við verandi skipan við rentustuðuli fáa tey, ið keypa hús ella íbúð rentustuðul í eini 25-30 ár. Tey, ið leiga fáa ongan líknandi stuðul.

Tey, ið fáa húsalán við rentustuðuli fáa sostatt ein íløgustuðul at keypa bústað. Vanliga veksur virðið á sethúsaogn við tíðini, so tey sum hava ráð at keypa hús fáa eina stóra eginogn við tíðini. Tá lánið er útgoldið, fer húsaeigarin ikki longur at gjalda fyri býlið.

Sum heild eru tey sum fáa húsalán frá fíggjarstovni hampuliga væl fyri, meðan tey sum ikki fáa lán at keypa hús ella íbúð oftast hava lágar inntøkur, eru støk, og viðhvørt eru tey stakir uppihaldarar.

Rentustuðulin er sostatt ein stuðul til tey sum hava góðar inntøkur, meðan fólk sum hava lægri inntøkur ella eru støk ongantíð koma inn á húsamarknaðin og tískil ongantíð fáa lut í tí uppsparingini og virðisøkingini, sum tað gevur at eiga eitt sethús.

Uppskotið hevur sum eitt av endamálunum at minka um omanfyrinevnda ójavna millum eigarar og leigarar. Við uppskotinum fáa leigarar ein stuðul til leiguútreiðslur og hetta tekur burtur ein part av muninum millum eigarar og leigarar. Tveir partar av ójavnanum standa tó eftir. Annar er at eigarar koma at fáa virðisøkingina í sethúsunum, meðan leigarin ikki fær hesa virðisøking. Hin er, at eigarin ikki longur skal gjalda fyri bústaðin, tá lánið er útgoldið, meðan leigarin skal rokna við at skula gjalda leigu fyri bústaðin, so leingi hann livir.

Samanumtikið er lógin um leigustuðul eitt stig tann rætta vegin, soleiðis at landskassin ikki bert stuðlar borgarum við góðum inntøkum við rentustuðli, men eisini veitir borgarum við lágum inntøkum ein stuðul til býlið, sum partvís vigar upp móti rentustuðlinum.

Stakir uppihaldarar

Um hugt verður eftir fíggjarviðurskiftum hjá støkum uppihaldarum, so er sjáldan, at stakir uppihaldarar eru fíggjarliga førir fyri at keypa hús ella íbúð, serliga fyrstu árini hjá børnum, tí at uppgávan at uppfostra børn ikki loyvir teimum at arbeiða so nógv. Í slíkum førum hóskar ein leigustuðul eisini sera væl.

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

Aðra mótrokningarskipan fyri pensjónistar enn fyri borgarar undir pensjónsaldur

Landsbankin metir, at tað er neyðugt at hava aðra mótrokningarskipan fyri fólk í pensjónsaldri, tí partur av inntøkuni er ikki skattskyldug (grundupphæddin) og tí roynist betri enn vanlig arbeiðsinntøka. Haraftrat verða pensjónistar lagaligari skattaðir enn persónar undir 67 ár (teir rinda ikki arbeiðsmarknaðargjøld), og hetta ger eisini, at inntøkan hjá pensjónistum roynist betri enn hjá borgarum undir 67 ár. Somuleiðis eigur at vera havt í huga, at borgarar yvir 67 sjáldan hava forsyrgjaraskyldur yvirfyri børnum.

Samanumtikið metir landsbankin at tað er rímiligt at hava ein øðrvísi mótrokningarstiga fyri pensjónistar enn tann fyri borgarar undir 67 ár. Landsbankin heldur sostatt, at mótrokningin hjá borgarum í pensjónsaldri eigur at byrja fyrr, tvs. eigur at byrja á eini lægri inntøku enn hjá borgarum undir 67 ára aldri.

Áseting um fastogn og fíggjarogn hjá borgarum

Seinastu árini eru møguleikarnir hjá eldri fólki at leiga sær íbúðir blivnir munandi betri. Nøkur teirra eiga tó framvegis bústað og nøkur eiga stórar fíggjarognir, so tey høvdu kunnað keypt sær hús.

Landsbankin metir, at tað eigur at vera eitt hámark, so húski, sum eru fíggjarliga sera væl fyri, ikki fáa leigustuðul.

Samskipan av mótrokningarskipanum í lógum um leigustuðul, familjuískoyti og fíggjarligum fripláss til barnaansing.

Við lógini um leigustuðul fer ein stakur uppihaldari at verða mótroknaður í trimum veitingum/rættindum í senn, í leigustuðlinum, í familjuískoytinum og tá talan er um fripláss til barnaansing. Veitingarnar/rættindini minka øll, tá inntøkan hjá staka uppihaldaranum veksur. Um ein tekur skattingina av inntøkuni hjá staka uppihaldaranum við í útrokningina, so er skjótt at mótrokning pluss skatt er so stórt prosent, at tað er arbeiðsforðandi.

Fyri at forða fyri, at stakir uppihaldarar ikki koma í eina støðu, har tað als ikki loysir seg at arbeiða, heldur landsbankin at tað hevði verið rættast, um Almannaráðið ger rokningar, sum vísa, hvussu hesar tríggjar mótrokningarskipanir virka tilsamans við skattaskipani.

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir